Næmingar fara at kunna seg um olju

Næmingar á Tekniska Skúla í Klaksvík fara fyrst í apríl kunningarferð til Aberdeen

Í løtuni sita næmingarnir á Tekniska Skúla í Klaksvík og fyrireika seg til eina spennandi námsferð til Aberdeen, har teir fara at kunna seg innan oljuídnaðin.

Næmingarnir verða í Aberdeen í tríggjar dagar, og er ætlanin sum vera man, at fáa so nógv burturúr sum gjørligt, og tað hava teir eisini fyrireika seg til. Teir hava fingið samband við stóra oljufelagið BP, og har fáa teir møguleika at síggja hvussu eitt tílíkt felag arbeiðir.

Teir fara eisini at vitja ein tekniskan skúla í Aberdeen. Frá næmingaráðnum verður sagt, at ferðin verður gjørd fyri at geva næmingunum ein møguleika at kunna seg innan oljuídnaðin og at finna aðrar útbúgvingarmøguleikar, og vóna teir, at hetta kann koma Føroyum til gagns.

tor.-

Nú fara næmingar við Tekniska Skúlan í Klaksvík at kunna seg innan oljuídnaðin

Nú verður søkt eftir fyristøðufólki til virkishúsið Margarinfabrikkina. Húsið er fyri børn og ung. Mynd: Kalmar

Margarinfabrikkin kann nú skjótt lata upp:

Norðurlendski Barnabati lønar fyristøðufólki

Á fundi í norðurlendska Barnabata-felagsskapinum varð um vikuskiftið samtykt at stuðla tiltakinum í Margarinfabrikkini í Havn

Nú kann virkishúsið Margarinfabrikkin í Tórsgøtu í Havn seta lýsingina í bløðini eftir einum føstum fyristøðufólki til húsið.

Hølini standa klár at taka ímóti børnum og ungum til ymiskt ítriv, og nú komu boðini av fundinum hjá norðurlendska Barnabati, sum hevur verið í Keypmannahavn um vikuskiftið, at felagsskapurin vil stuðla tiltakið við at løna fyristøðufólki næstu trý árini.

Vibeke Ingvarsson, formaður í føroyska Barnabata sigur, at norðurlendsku feløgini sýndu hesum tiltaki stóran áhuga beint sum tey hoyrdu um tað, og tey boðaðu frá so at siga beinanvegin, at tey vildu stuðla á ein ella annan hátt. Nú er sjálv samtykan gjørd, og so er ikki leingi at bíða til húsið kann fara at virka.

Vibeke Ingvarsson leggur tó dent á, at eitt er ein løntur leiðari til húsið, ikki minni týdningarmikið er við sjálvbodnu arbeiðsmegini, og tað ivast hon ikki í at tað fer at bera til.

Tey ungu sjálv við

Tórshavnar Kommuna eigur húsini, og hevur stuðlað peningaliga at fáa sett húsini í stand. Frá verkætlanini Ung í arbeiði hava fleiri ung í longri tíð arbeitt har, og ein arbeiðsbólkur hevur staðið fyri allari verkætlanini.

Endamálið við húsinum er, at hetta skal vera eitt stað, har børn og ung kunnu koma saman til ymisk ítriv.

tor.-

Dansiroynd í broytingartíð

ummæli

Írland í triatiárunum og Føroyar/Havnin í nitiárunum! Er okkurt her, sum bindur saman? Kann tað vera fátækdømi og skerdir møguleikar? Kann kæti og lívshugur verða vernd móti ágangínum? – Hvar er longsulin í einum fólki, hvørs mentanarligi síðaarvur er um at sindrast? Ella missa vit evnini at lurta, nema og kenna, tá ið samfelagið knógvar undir tungum byrðum? Hví kemur longsulin eftir eini tíð, har verúligu lívsvirðini eru uppgjørd í gerandislívi og umstøðum. Er hetta tilvildarligt, ella skalt tú finna samanhangin her? Hvussu skal eitt fólk koma víðari, tá ið siðir og skikkir mugu finna nýggja rás? Hvør skal andaliga leiða fólkið?

Hetta kom eg at hugsa um, tá Havnar Sjónleikarfelag hevði fyrstu framførslu av týdda leikinum »Dansur í fyllandi sól« eftir íran Brian Friel.

Sum áskoðarar til húskið Mundy í írska býnum Ballyberg, síggja vit 5 konufólk liva og virka við skerdum møguleikum. Tað sama gera nógv húski í Føroyum í dag. Máttloysi kann ikki bera mentanarførning longur fram á vegin. Kunnu dreymar og dansistig í fyllandi sól gera nakað?

Haldi at leikur sum endurspeglar menniskjað í tungari sosialrealismu við poetiskum pennastroki sigur, at tað ber til at taka tað mesta frá okkum, men dreymin, sum kom til sjóndar í dansinum, eiga vit í hjartanum. Meðan eggjandi dansistig í nevnda leiki nam við eitt hvørt sálarligt, kom eisini føroyski dansurin sum søga og rørsla fram fyri meg, og eg varnaðist samanhang.

Eyðun Johannessen, føroyski leikstjórin á flatlondum, er komin heim við hesum leiki. Hann er ikki bara sjálvur komin til Havnar, men hevur latið okkum eitt listaverk, sum samstundis er eitt dømi um, hvussu listafólkini kunnu geva okkum ábendingar um tað sum rørist í tíðini og vísa okkum krossvegir.

Leikuppsetingin í Sjónleikarhúsinum er eitt myndlistaverk av teimum heilt neyvu.

Pallmyndin er ikki einans eitt leikaraumhvørvi, hon er líka nógv ein ferðan í tíð, har menniskjað í tíðini er tað mest áhugaverda. Hvør karakterur eigur sína sjálvstøðu og tilsamans siga tey eina góða og væl fortalda søgu.

Vit eru m.a. vitni til innistongdan erotiskan longsul og lívsjáttandi kæti, sjálvt tá ið tað sær myrkast út.

Leikararnir Terji Rasmussen, Jytte Olsen, Hjørdis Johansen, Birita Krossteig, Fía Norðberg, Malan Thomsen, Rasmus Magnussen og Óli Kurt Hansen siga okkum søguna og søgan er hugtakandi. Meti at hetta leikverk er ov stór avbjóðing leiklistarliga, at í støðum rakk ikki til. Her er talan um línugongd av teimum torføru. Best frá tulkingini komu Rasmus Magnussen, Óli Kurt Hansen, Jytte Olsen og Birita Krossteig.

Haldi at venjingartíðin møguliga hevur verið ov stutt til, at hvør leikari hevur fingið leiklutin inn undir húðina, og hetta ger at leikurin fellur í støðum. Tó er onki at taka seg aftur í, at hetta er framkomin spælháttur og eisini krevjandi hjá áskoðarunum at fáa tær smáu nyansurnar við.

Nógv symbol, sum ikki eru einføld, geva áskoðarunum nakað at hugsa um.

Sjónleikarhúsið við størsta leikfelagnum í landinum, hevur við hesum leiki megnað at flyta seg listarliga og geva húsinum leikmynd, sum krevur alt – onki minni.

Tey, sum ynskja at uppliva góðan sjónleik, eiga at fara í Sjónleikarhúsið.

Allir politikarar eiga at kenna sína ábyrgd at vit fáa leiklistini betri sømdir, tí onki fólk kann liva uttan at hugsa um lív og umstøður. Sjónleikur kann í førum vera radarin, sum hugt verður í, tá ið mjørkin sígur saman um.

Tórshavn, hin 5. febr. 1995

E.Ø.